

## Jamm-kvøldini flutt í Kaggan

Havnar Jazzfelag hevur seinastu árini skipað fyri jamm kvøldum, har føroyskir tónleikarar mikukvøld hittast. Tiltøkini hava verið væl umtókt, men hava ferðast kring býin. Seinastu tíðina er tað Cleopatra, ið hevur lagt høli til jammini, men nú tekur Kaggin yvir. Heðin Ziska Davidsen frá Havnar Jazzfelag sigur, at felagið hevur valt at broytt mannagongdina eitt sindur. – Ofta vóru tað tey somu fólkini, ið jammaðu, fyri at skapa eitt sindur av útskifting, hava vit nú valt, at ein ábyrgdarpersónur tekur sær av tónleikinum í ein mánað, síðan tekur ein annar yvir, hesin skaffar so bólk hvørt kvøldið og tílíkt, greiðir Heðin frá. Fyrsta mánaðin hevur hann ábyrgdina.

## Juliannu Boys spæla til føstulávintsdans á Strondum

Leygarkvøldið verður føstulávintsdansur í Bygdahúsinum á Strondum, har Juliannu Boys saman við øðrum spæla. Juliannu Boys eru Árni og Marnar, teir eru kendir fyri sínar frálíka góðu sangir.

Teir hava givið fleiri fløgur út, undir egnum navnið og sum Black Birds. Tað er Strálan, ið skipar fyri tiltakinum og hetta verður gjørt fyri at savna pening inn til at byggja Neyst til bátarnar upp til komandi kappingarár. Felagið eigur tríggjar bátar Stráluna, Stjørnuna og Strípuna.

## Stjørna í Manhattan

**Gunnar Mikkelsen spælir í fríggjakvøldið og leygarkvøldið á Manhattan. Hetta verður eitt høvi at uppliva Stjerne For En Aften vinnarin á palli í Føroyum.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hálvi føroyingurin Gunnar Mikkelsen gjørdist av álvara kendur, tá hann gjørdi Guðruni Sólju Jacobsen eftir og vann kappingina Stjerne For en Aften á Danmarks Radio. Við egnum tolkingum av løgunum Why Does It Always Rain On Me hjá Travis og The Scientist hjá Coldplay vann dámligi ljóshærdi drongurin nógv hjørtu. Meðan siðbundin popprokkur, soul og reindyrkaður poppur vóru dominerandi í kappingini, var Gunnar sum eitt frískt lot. Hansara fyrsta fløga The Best Piece Of Advice Always Comes A Little Too Late, varð eisini væl móttikin, ummælini vóru sum heild góð, og lagið Haunted Honeymoon var nógv at hoyra í donskum miðlum, umframt, at tað eisini varð spælt nakað í USA.

Danskir miðlar vóru skjótir at spáa Gunnari eina stóra framtíð og vístu á, at her kundi talan vera um okkurt annað enn vanligu døgnflugurnar, ið Stjerne For En Aften hópframleiddi. Men hvussu er og ikki, so hevur lítið og einki verið at hoyrt til Gunnar seinastu árini, vitjar tú heimasíðu hansara, sært tú at seinastu tíðindi eru løgd út í mai 2005. Men fyri føroyingar er Gunnar aktuellur við jøvnum millumbilum, tá hann vitjar sum barrsangari, hetta ger hann m.a. í komandi vikuskifti.

Hann spælir fríggjakvøldið og leygarkvøldið á Manhattan.




# Asfalt verður í juni

**Í juni í fjør var Asfalt á fyrsta sinni hildið í Tórsgøtu í Havn. Nú er greitt at aftur í ár fer føroyskur tónleikur at ljóma í Tórsgøtu**

ASFALT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

- Vit halda fast í sama konsepti, sum gongur uppá at gera føroyskan tónleik sjónligan og at fáa nýggjar bólkar fram, sigur Bogi Andreassen høvuðsfyriskipari av tónleikatiltakinum Asfalt, ið verður hildið á øðrum sinni í døgunum 4.-9. juni.

### Konseptið óbroytt

Í fjør gekk sambært Boga betur enn væntað og tí verður grundhugsjónin sum so ikki broytt, men tiltakið verður víðkað til eisini at umfata aðra list, umframt at tað í ár verður frá mánadegi til leygardag.

Bogi greiðir frá, at nøkur ivamál vóru, tá tey fóru undir tiltakið eitt nú var spurningurin, um tað bar til at hava so nógvar konsertir innan fyri eitt so stutt tíðarskeið og um nóg nógvir góðir føroyskir bólkar vóru, men báðir hesir spurningar kundu tey eftir tiltakið svara játtandi.

Tað var eisini sera gleðiligt at uppliva hvussu væl fólk tók ímóti tiltakinum, sigur Bogi, ið hevur fingið góðar afturmeldingar frá bæði áskoðarum og frá luttakarum.

Bogi sigur, at nú tiltakið verður víðka í dagatali, verður eisini høvi at taka aðrar partar av miðbýnum við í verkætlanina, her kunnu t.d. vera framførslur og framsýningar í eitt nú samkomuhølum og á bókasavninum.

### Einki tal sett á

Í fjør varð skjótt meldað út, at Asfalt ætlaði at húsa 70 føroyskum bólkum, og hóast endaliga talið gjørdist 64 m.a. orsakað av nøkrum avboðum og fyri at tíðarætlanin skuldi ganga upp, so metir Bogi at hetta málið var rokkið nøkurlundað. Hann vil tó ikki leggja seg fastan á nakað ávíst tal enn. Men viðgongur, at fleiri nøvn longu eru komin upp á pláss, og fleiri onnur hava víst tiltakinum áhuga.

- Vit fara í næstum at kunngera fyrstu nøvnini, sigur Bogi.

Hann vísir á, at enn er nógv pláss eftir á skránni, so tí ber til hjá bólkum at seta seg í samband við Asfalt.

- Vit vilja gjarna bjóða okkurt nýtt fram eisini, so nýggir bólkar eru vælkomnir at senda okkum demoir og tílíkt, sigur Bogi



*Bogi Andreassen er aftur í ár høvuðsfyriskipari av Asfalt*
*mynd: Jens Kr. Vang*

### 16 skeinkiloyvir

Í mun til øll hini tónleikatiltøkini og festivalarnar valdi Asfalt ikki at skeinkja sterkt inni á økinum í fjør. Henda politikk ætla tey at halda fast í.

- Í grannalagnum kring Asfalt eru 16 skeinkiloyvir, og vit eru sannførd um, at tey, ið umsita hesi loyvi, duga nógv betur at taka sær av hesum enn vit, so tí fara vit ikki at leggja okkum út í kapping við tey.

### Spæla fyri spælistað

Umfram at sjónliggera føroyskan tónleik er Asfalt eitt stuðulstiltak. Í fjør var avgjørt at yvirskotið skuldi fara í ein grunn, ið skuldi virka føroyskan tónleiki at frama. Í ár verður enn eitt stig tikið fyri at tryggja, at partur av inntøkuni verður settur av til vælgerandi endamál innan tónleikin. Í staðin fyri at teir bólkar, ið luttaka á Asfalt fáa samsýning fyri sína luttøku, verður ein ávís upphædd fyri hvønn bólkin sett á eina konto, ið skal brúkast føroyskan tónleiki at frama. M.a. til áhaldandi arbeiðið at skapa eitt spælistað í høvuðsstaðnum. Bogi greiðir frá, at tá arbeitt verður við einum tiltakið sum Asfalt, so verður arbeitt við hjartanum og ikki orsakað av fíggjarligum áhugamálum, men á henda hátt verður peningur í øllum førum til føroyskan tónleik.

### Somu høvuðsstuðlar

Aftur í ár eru Føroya Banki og Tórshavnar kommuna høvuðsstuðlar, bankin skrivaði í fjør trý ára avtalu við Asfalt. Fyri kommununa er Asfalt í trá við áhaldandi ætlanirnar um at gera Tórsgøtu til mentanargøtu.



Altíð tað nýggjasta

www.sosialurin.fo